Fleyr-ÍF 1-3 ( 25-22, 20-25, 19-25, 22-25)

# ÍF vann í Havn

**Lagt var upp til ein sera spennandi dyst í Gundadalshøllini hóskvøldið, bert 4 dagar eftir at hesi liðini høvdu leikt steypafinalu í NS-cup í Klaksvík seinasta vikuskifti, tá ÍF vann 3-0 og harvið tryggjaði sær annað finaluplássið í steypafinaluni á Hálsi 17. februar ímóti Mjølni**

FLOGBÓLTUR, MENN

Fyrsta settið leikaði javnt á, og liðini fylgdust alla tíðina stig um stig. Tað var ongantíð at annað liðið var meira enn 3 stig frammanfyri, og liðini skiftust eisini um at vera á odda, men samanumtikið kann sigast, at Fleyr hevði munin hetta settið, sum havnarmenninir eisini vunnu 25-22.

Í settinum legði ein serliga til merkis Steinar Eiríkstoft, sum sló eini 4 góð stikk beinleiðis í gólvið, uttan møguleika hjá ÍF at bjarga.

Hjá ÍF var tað serliga jugoslavin Boban, sum vann bóltarnar úti á kantinum, meðan tað var meira stillið inni á miðjuni.

### Bartal góðar servur

Eftir at Fleyr hevði vunnið fyrsta settið, væntaði ein, at nú var sloppið hjá teimum, og tað væntaðu teir kanska eisni sjálvir, men hetta vildi Bartal Eliassen, ÍF, annarleiðis. Við nøkrum beinraktum servum, var hann við til at leggja ÍF á odda í 2. setti heili 6-1, men Fleyr kom aftur við í dystin, og var tað eisini við góðum servum frá Klæminti Isaksen. Fleyr kom nú á odda 10-8, men so støðgaði upp, og ÍF hevði leiðsluna restina av settinum.

Móti endanum kom ÍF fram um 22-17 við m.ø. góðum blokkum hjá Kenneth Neshamer, ÍF, sum serliga hevði lagt seg eftir at royna at blokka Klæmint Isaksen úti á kantinum, og hetta eydnaðist til tíðir væl.

ÍF vann settið 25-20, og við støðuna 23-20 fekk Johannes Ejdesgaard, Fleyr, skaða, og roknað var við at hann mátti gevast, men so var ikki. Hann var fyrsti maður inn á vøllin aftur í triðja setti.

### Tummas ov seint inn

Í byrjanini av 3. setti fór ÍF aftur frá Fleyr, og koma á odda 7-4, og hesa leiðsluna helt liðið meginpartin av settinum. Í hesari løtuni vóru fleiri misskiljingar millum hevaran hjá Fleyr, Jákup V. Sivertsen, og hinar leikararnar. Við støðuna 20-12 til ÍF valdi Fleyr at royna seg við Tummas Óla Mortensen sum hevara, tí í seinasta dystinum teirra millum vendi hann einum tapi til ein sigur. Men hesaferð fall útskiftingin ov seint.

Fleyr háløði seg heilt upp á 19-23, men gjørdust ov stuttir til at vinna settið, sum ÍF vann 25-19.

### Javnt 4. sett

Javnt gekk á fram til støðuna 19-20, tá ÍF bráðliga legði seg fram um til støðuna 24-19, eftir at Johannes Ejdesgaard m.a. hevði brent tvey smassj. Johannes Ejdesgaard vann nakrar bóltar í dystinum og fekk nógv upplegg, men hann brendi eisini nógv - partvís ávirkaður av skaðanum hann fekk í 2. setti.

Fleyr vann bóltin aftur og háløði nøkur stig inn, men við Boban frammi við netið og støðuni 24-19, var tað bert ein spurningur um tíð, til hann fór at vinna ein bólt, og harvið tryggja ÍF sigurin.

Og so var. Seinasta bóltin smasjaði Boban beinleiðis í gólvið til sigursúrslitið 25-19 til ÍF.

### Uppiborið

Samanumtikið ein uppiborin sigur til ÍF, sum bardist allan dystin og fyri hvørjum bólti.

Fleyr gjørdi í dystinum ov nógvar feilir, og serliga legði ein til merkis, at liðið ikki fekk nóg góðan valuta fyri teir bóltar, sum vóru “bíligir”, og sum liðið eigur at vinna, eins og móttøkan kundi verið betri.

Skal Fleyr vinna á Mjølni í ár, skal liðið minka um feilirnar og betra eitt sindur um blokaduna. ÍF haraftur-ímóti kann møguliga spæla Mjølni eitt puss, um teir fáa eitt sindur sterkari blokadu á miðjuni, og harvið fáa støðga Trygva H. Poulsen.

Fleyr-ÍF 1-3, (25-20, 23-25, 24-26 og 24-26)

# Hesuferð vann ÍF

**Ein sera javnur dystur, har bæði liðini kundu havt vunnið, men hesuferð var tað ÍF sum leikti betri og vann dystin 3-1.**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Fleyr kom annars best frá byrjan og vann 1. settið 25-20, eftir eitt sera javnt sett. Men so kom vend í, hóast at hini settini eisini vóru jøvn. Næsta settið vann ÍF 25-23, men hetta var aftaná at tær høvdu verið aftanfyri. Fyrst servaði Poula Petersen tríggjar bóltar, soleiðis at ÍF kom fram um 23-21, men Fleyr gavst ikki so, og vann seg upp á javnt við servum frá Duritu Jóansdóttir. Men so gjørdi Annika Rasmussen, ÍF, bart, og servaði settið heim við støðuni 25-23.

### Spennandi endi

Var næsta settið spennandi so vóru 3. og 4 tað ikki minni. 3. settið endaði 26-24 til ÍF, og í tí 4. legði ÍF seg beinan vegin klárt á odda og førdi 14-5 og 20-9, men so støðgaði upp, og Fleyr menti seg aftur.

Vend kom í, tá Teresa Fjalsbak fór at serva, og hon var við til at vinna heilar 6 bóltar, soleiðis at støðan gjørdist 24-23 til Fleyr. ÍF vann bóltin aftur, og leikti seg upp á 25-24. Bólturin aftur til Fleyr, men Karina Ottosen, Fleyr var so óheppin, at hon servaði út, og harvið vann ÍF settið 26-24 og harvið dystin 3-1.

ÍF hevur nú sama stigatal sum Fleyr í endaspælinum.

# Spenningur í Klaksvík leygardagin

Nógvir dystir vera leikti hetta vikuskiftið í bestu flogbóltsdeildini hjá kvinnum og monnum, við tað at fleiri av liðunum hava tveir dystir.

Hjá monnunum verður tann mest spennandi dysturin í Klaksvík, har Mjølnir fær vitjan av Fram. Um Fram framvegis ætlar at vera við í kappingini um FM-heitið, so skulu teir helst vinna henda dystin, sum verður í KÍ-høllini kl 15,00

Eisini dysturin millum kvinnuliðini hjá Mjølni og TB kann gerst spennandi, tí hetta eru somu liðini sum leiktu NS-cup finaluna seinasta sunnudag, tá Mjølnir vann 3-1. Um TB hevur somu framgongd, kann tað eisini henda at spenningur verður kl. 13,00 í KÍ-høllini.

### Í Trongisvági sunnudagin

Ímóti Mjølni leygardagin og so beint í eldin ímóti oddaliðnum Drátti sunnudagin í høllini í Trongisvági. Hetta er kosturin hjá TB. Seinasta leygardag vann TB ímóti Drátti, men um tær megna at endurtaka bragdið, er ringt at siga, tí Dráttur hevur leikt væl higartil í landskappingini, men við góðum stuðli frá viðhaldsfólkunum, kann nógv gerast á Tvøroyari.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13-jan | MM | 16.00 | **SÍ-ÍF** | Sørvágur |
| 13-jan | MM | 15.00 | **Mjølnir-Fram** | KÍ- høllin |
| 13-jan | MK | 13.30 | **Dráttur-ÍF** | Giljanes |
| 13-jan | MK | 13.00 | **Mjølnir-TB** | KÍ-høllin |
| 14-jan | MM | 15.30 | **Fram-SÍ** | Eystursk. |
| 14-jan | MK | 13.00 | **Fossánes-Fleyr** | KÍ-høllin |
| 14-jan | MK | 13.00 | **TB-Dráttur** | Trongisv. |

# Vann stóra frisørkapping í Danmark

**16 ára gamli Karsten Høgnesen úr Leirvík vann herfyri eina frisørkapping, sum danska ungdómsblaðið Vi Unge skipaði fyri**

FRISØRKAPPING

*Stefan í Skorini*

Tað liggur væl fyri hjá Karsteni Høgnesen úr Leirvík at fríðka um hár, og hann hevur longu tikið avgerð um, at hetta skal vera hansara yrki, tá hann er liðugur í fólkaskúlanum.

Í heyst skipaði danska ungdómsblaðið Vi Unge fyri eini frisørkapping. Tú skuldi gera eitt hársnið á einum persóni, og síðani senda inn eina mynda av hársniðinum.

Í desember mánaði fekk Karsten boð aftur frá Vi Unge um, at hansara hársnið varð valt at vera millum tey bestu.

Karsten fekk Jonnu Johannesen at sita modell hjá sær, meðan hann gjørdi listaverkið.

Karsten vann fyri túsund krónur av tingum, sum hann kann nýta til hárfríðkan.

– Mær dámar bara sera væl at fáast við hár, og tað eg sá kappingina, so sendi eg fleiri myndir inn av mínum hársniði, og tað eydnaðist bara væl, sigur Karsten.

Fyri góðum ári síðani fór Karsten undir at klippa fólki, hann kennir, og tað er ikki so sjáldan, at hann fær boð um at koma út at klippa onkrum.

– Eg havi altíð viljað gjørt hár, og nú plagi eg at klippa fleiri fólkum, sum eg kenni, sigur dugnaligi hárfríðkarin.

Um hálvtannað ár, tá Karsten væntandi fær prógvið handað, so hevur hann ætlanir um at fara í frisørlæru, og sigurin í hesi kappingini skuldi verið góð reklama at víst fyri einum komandi arbeiðsgevara.

*savnsmynd*



Vikuskifti

Nr. 9 • leygardagur • 13. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Dánjal av Rana:

**Hugsjónin hevur drivið verkið**



síða 24 - 25



*Mynd: Jens K. Vang*

Nýggjárskonsertin 2001:

# ”ikki fekst meiri fyri hetta tíggjuoyrað”

**Vónandi merktu tit, at lurtarafjøldin var nøgd við úrslitið. Tað vóru mong uttanum meg, har eg sat, sum vildu hoyra meir, men ”ikki fekst meiri fyri hetta tíggjuoyrað”, sum Walt Disney á sinni segði. Men, vit hoyrast aftur eina aðru ferð, skrivar Victor Carlsen m. a. í ummælinum av sjeyndu nýggjárskonsertini hjá Føroya Symfoniorkestri seinasta sunnudag**